# Slagið um oddasessin í Runavík




*Sannur oddadystur verður í Runavík um vikuskiftið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR** Oddadysturin um vikuskiftið er í Runavík. Tjaldur fær vitjan av oddaliðnum Neistanum

Uni Holm Johannesen

Oddaliðini hava framvegis ráð at traðka við síðurnar av. Men hinvegin fær vinnandi liðið tvey sera týdningarmikil stig, meðan ein av nærmastu kappingarneytunum snávar.

Tað kann vísa seg at verða sera umráðandi.

Tað vita bæði kvinnurnar hjá Tjaldur og hjá Neistanum, áðrenn oddadystin í Runavík. Neistin er fremst við 24 stigum, og Tjaldur er nummar tvey við 23 stig. Stjørnan er nummar trý við 22 stigum.

Tí er spurningurin, um viljin at vinna er størri enn óttin at tapa í Runavík sunnudagin.

### Torfør uppgáva

Stjørnan skal á vitjan hjá Kyndli sunnudagin. Grønlittu kvinnurnar úr høvuðsstaðnum fingu stig móti Neistanum í vikuni. Grannauppgerðir eru altíð nakað serligt, og spurningurin er, um Kyndil fer á vøllin við sama stríðsvilja hesaferð. Verður tað so, verður uppgávan hjá Stjørnuni sera torført at loysa.

VÍF fær vitjan av VB í høllini í Vestmanna.

uni@sosialurin.fo

# Skála skal varðveita sætið

**FÓTBÓLTUR** 21 ára gamli Eliesar Jónsson Olsen er settur sum høvuðsvenjari hjá Skála. Hann ger greitt, at málið er fremst av øllum at varðveita sætið í næstbestu deildini

Uni Holm Johannesen

Eliesar Jónsson Olsen fær seg av álvara royndan sum fótbóltsvenjara í ár. 21 ára gamli skálamaðurin er settur sum venjari hjá Skála, sum spælir í næstbestu deildini.

Hann sigur við faroesoccer.com, at liðið fremst av øllum hevur sett sær sum mál at varðveita sætið í deildini.

– So arbeiða vit harfrá. Vit hava eitt nýtt og ungt lið, og vónirnar eru at fáa eitt stabilt og væl samanspælt lið, sigur hann.

Skála hevur lagt stóran dent á ungdómsarbeiðið seinastu tvey árini. Miðalaldurin á liðnum, sum Eliesar Jónsson Olsen skal stjórna, er um 20 ár.

Eingin fær pengar fyri at spæla fótbólt á Skála í ár heldur.

uni@sosialurin.fo

## Ítrótturin um vikuskiftið:

**Leygardagin, 22. januar:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | Ternan – ÍF | Toftir | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | SÍ – TB | Sørvágur | Klokkan 15.00 | Menn |

**Sunnudagin, 23. januar:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| HONDBÓLTUR | VÍF – VB | Vestmanna | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – Stjørnan | Tórshavn | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | TB – SÍ | Trongisvágur | Klokkan 14.30 | Kvinnur |
| HONDBÓLTUR | Tjaldur – Neistin | Runavík | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – Fleyr | Klaksvík | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | ÍF – Mjølnir | Fuglafjørður | Klokkan 15.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | VÍF – KÍF | Vestmanna | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | Kyndil – Team Kl. | Tórshavn | Klokkan 16.00 | Menn |
| HONDBÓLTUR | H71 – Neistin | Hoyvík | Klokkan 16.00 | Menn |

# Nú skal bera ella bresta

**HONDBÓLTUR** VÍF fær gyltan møguleika at toga seg tvey stig nærri finaluplássinum, tá KÍF vitjar í Vestmanna um vikuskiftið

Uni Holm Johannesen

Trý stig skilja liðini íáðni.

VÍF hevur vunnið seg spakuliga nærri KÍF og øðrum finaluplássinum seinastu vikurnar. Úrslitið er, at undan dystinum millum liðini um vikuskiftið, kunnu kollfirðingar ikki kenna seg tryggar.

Um VÍF fær fult er eitt stig á muni, og kollfirðingar hava spælt ein dyst minni. Nú skal bera ella bresta hjá vestmenningum.

### Neistin í Hoyvík

Neistin buldrar víðari, og tað tykist sum, at eingin kann steðga teimum.

Týskvøldið stóðu grannarnir úr Kyndli fyri skotum. Neistin vann stórsigur, 37-23.

Sunnudagin fær H71 vitjan av verandi greipuvinnarunum. Hoyvíkingar eru dragnaðir av álvara í stríðnum um finalupláss seinastu vikurnar. Sjálvsvirðið er neyvan høgt í Hoyvík í løtuni. Hinvegin kann tað verða ein fyrimunur fyri hoyvíkingar, at einki trýst er á teimum undan grannauppgerðini sunnudagin. Eingin væntar, at H71 fær stig burturúr.

### Kyndil hvílir seg

Kyndil fær vitjan av botnliðnum Team Klaksvík, sum beyt frá sær mikukvøldið. Klaksvíkingar, sum framvegis hava sítt fyrsta stig til góðar, taptu við fimm málum, tá VÍF vitjaði. Tað er minsta tapið í hesum kappingarárinum.

At spæla á heimavølli móti Team Klaksvík er, á pappírinum, lættasta uppgávan í hesum kappingarárinum. Kyndil fer helst at hvíla nakrar av stuðulsleikarunum, og lata unglingarnir sleppa framat hesaferð.

uni@sosialurin.fo

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 15 | 531 | 407 | 124 | 29 |
| 2 | KÍF | 14 | 402 | 361 | 41 | 19 |
| 3 | VÍF | 15 | 419 | 382 | 37 | 16 |
| 4 | Kyndil | 15 | 376 | 384 | -8 | 15 |
| 5 | H71 | 13 | 339 | 344 | -5 | 12 |
| 6 | StÍF | 15 | 371 | 385 | -14 | 9 |
| 7 | Team Klaksvík | 13 | 291 | 466 | -175 | 0 |

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 15 | 409 | 338 | 71 | 24 |
| 2 | Tjaldur | 14 | 401 | 316 | 85 | 23 |
| 3 | Stjørnan | 14 | 406 | 335 | 71 | 22 |
| 4 | Kyndil | 15 | 358 | 360 | -2 | 13 |
| 5 | VB | 14 | 339 | 346 | -7 | 13 |
| 6 | VÍF | 15 | 342 | 421 | -79 | 6 |
| 7 | StÍF | 15 | 286 | 425 | -139 | 1 |